## DAGSINS MEINING

# Fólkaflokkurin og skilagóðar avgerðir

Fólkaflokkurin hevur altíð útmerkað seg í skeivari støðutakan. Í teimum so nógv umrøddu 80'unum ráddi Fólkaflokkurin til, at landið skuldi bjarga gasstangaskipunum, ið fóru á heysin. Tað gjørdi man tíbetur ikki. Fólkaflokkurin var hart ímóti einum av teimum tíverri alt ov fáu bremsitiltøkunum, ið vóru framd í 80'unum, nevniliga oljuavgjaldið. Aftaná vísti tað seg, at júst hetta tiltakið var eitt av fornuftigastu tiltøkunum, ið framd vóru í 80'unum.

Hvør minnist ikki, tá Fólkafloksmenn stóðu á sjónvarpsskýggjanum síðst í 80'unum og bedýraðu, at í Føroyum var eingin rentuspekulatión. Tíbetur dugdu aðrir enn Fólkaflokkurin at síggja, hvussu støðan var, og spekulatiónin varð steðgað – betur seint enn ongantíð. Eisini var tað Fólkaflokkurin, ið bað politikarar halda fingrarnar vekk frá bankunum, tí tað høvdu bankaleiðslurnar og eingin annar skil fyri. Vit sóu tann 6. Oktobur 1992, hvussu var við tí. Fólkaflokkurin var ímóti stovnanini av Fiskavirking. Aftur vóru tað aðrir, ið tíbetur vóru framsíggnir nokk til at gjøgnumføra hetta uttan Fólkaflokkin.

Nú kann eingin flokkur siga seg frían fyri feildisponeringum, kanska serliga í 80'unum, men grundin til at vit draga serliga Fólkaflokkin fram er, at hann eftir okkara tykki hevur verið tann, ið mest konsekvent hevur tikið skeivar støður.

Endamálið hjá okkum her er ikki bert at peika afturum, men at ávara móti, at søgan endurtekur seg. Fólkaflokkurin er og verður tann sami, og tí eigur man altíð at fylgja sera væl við, hvat hann sigur og ger. Serliga í hesum tíðum, har hann, takkað verði samgongufeløgunum, situr tungt á so at siga øllum vinnumálum.

Fólkaflokkurin leikar øgiligt í, hvørja ferð onkur vil debattera fiskivinnuskipanina. Vit hoyrdu hetta í útvarpsorðaskiftinum fyrr í vikuni. Orðaskiftið tók mestsum ein tragikomiskan karakter, tá Løgmaður segði, at milliónaupphæddir forvunnar av sølu av fiskiloyvum, ið hesir somu menn hava fingið fyri einki frá landinum, ikki longur var ein trupulleiki, tí at nú var vinningurin skattskyldugur. Her síggja vit eina klassiska fólkafloksloysn. Ístaðin fyri at steðga spekulatión við landsins virðum, so ger man bert hesa spekulatión "stovureina" við at gera vinningin skattskyldugan.

Dømi um fiskiloyvini vísir meira enn nakað annað, at Fólkaflokkurin einki er broyttur tey seinastu árini. Vit hava her á hesum stað ikki brúkt nógv pláss uppá at viðgjørt reform av fiskivinnuskipanini í Føroyum, men tá nú Fólkaflokkurin er so hart ímóti nýggju tonkunum, ið eru frammi, so kunnu nýggju tankarnir ikki verða heilt av leið. Søgan hevur víst okkum, at hvørja ferð okkurt initiativ fær rós í litfaldaranum hjá Fólkaflokkinum, Dagblaðnum, so er at verða á varðhaldi.

Tað er at vóna, at góðar kreftir seta seg saman og endurskoða fiskiveiðuskipanina, soleiðis, at spekulatión verður steðgað, og at vit ikki aftur verða tikin av fótum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lat OECD kanna føroyska búskapin



**Høgni Hoydal**

Orðaskiftið um føroyska búskapin druknar í politiskum útleggingum, har ein rópar í eystur, og hin svarar í vestur. Skulu vit halda fast um búskaparstýringina til ein sjálvberandi búskap, so eiga vit at lata altjóða viðurkendar stovnar gera regluligar metingar um støðuna.

Metingar, sum kunnu samanberast við onnur lond, og sum setur okkum altjóða krøv.

Fíggjarmálaráðharrin Karsten Hansen hevur nevnt møguleikan at biða OECD ella ein annan altjóða stovn, gera eina kanning av føroyska búskapinum. Landsbankastjórin hevur skotið upp, at uttanveltaðir serfrøðingar gera eina "rating" av føroysku uttanlandsskuldini

Hetta eru frálík og neyðug uppskot. OECD brúkar altjóða sambærlig tøl og kannar eisini bygnaðin í búskapinum og teir mongu tættirnar, ið hava týdning fyri búskapargongdina. Tildømis: Útbúgving og gransking, samferðslu- og samskiftismøguleikar, býtið millum alment og privat o.a.

Hetta kann taka føroyska búskaparpolitiska orðaskiftið og avgerðirnar úr føroysku ostaklokkuni og kann fáa okkum at seta okkum sjálvum altjóða krøv.

Og vit áttu at fingið metingarnar regluliga.

Partapolitiska málingin má burtur.

Orðaskiftið um fíggjarlógina hevur aftur prógvað, hvussu neyðugt tað er, at vit fáa metingar frá altjóða stovnum um búskapargongdina.

Fíggjarmálaráðið, Búskaparráðið, Landsbankin og Hagstova Føroya hava gjørt eitt sera gott arbeiði at fáa skil á landsroknskapum, tjóðarroknskapi og øðrum neyðugum amboðum. Men hesi risastóru framstig drukna í tí partapolitiska tvassarínum.

Tað var tildømis ikki fyrr enn í 1999 at vit fingu dagførdar roknskapir fyri landskassan. Áðrenn tað, bleiv nógv meiri brúkt á hvørjum ári, enn fíggjarlógin vísti. Tað kom bara ikki fram, tí roknskapurin kom ikki fyrr enn nógv ár seinni.

Kortini royna andstøðuflokkarnir at billa fólki inn, at onki skil er á, og at undirskot er á fíggjarlógini. Men samstundis mæla teir til at brúka meiri almennan pening. Teir hava enntá biðið eitt valevni hjá sambandsflokkinum um at upptraðka sum búskaparfrøðingur í bløðum og á fundum, hóast talan sjálvsagt er um ein reinan partapolitiskan boðskap.

Samgongufloкkarnir tosa eisini í hvør sína ætt, tá tann veruliga støðan í búskapinum skal viðgerast. Skattapolitikkur, íløgur og onnur stýringsamboð verða kastað upp sum partapolitiskt valagn, heldur enn boð um veruligan búskaparpolitikk.

Ongin viðger støðuna út frá sama grundarlagi.

Tað er ikki til at liva við. Tí sjálvandi skulu partapolitiskar ósemjur vera um førda búskaparpolitikkin. Men vit mugu tosa út frá nøkulunda somu metingum um, hvussu gongdin hevur verið, og hvussu støðan er.

### Spurningar, ið eiga at svarast

Tað hevði verið sera kærkomið at fingið eina óhefta meting av tildømis hesum spurningum:

- Hvussu er støðan í føroyska búskapinum í mun til onnur OECD-lond - hvussu við útbúgving, gransking og umstøðurnar at draga arbeiðsmegi til Føroya?

- Hvussu stórt er yvirskotið á rakstrinum hjá landskassanum, um vit samanbera við onnur OECD-lond?

- Hvønn týdning hevur føroyska skatta- og avgjaldsskipanin - umframt aðrar almennar skipanir - fyri kappingarførið hjá vinnuni?

- Hvussu hevði støðan hugsandi verið í føroyska búskapinum, um vit høvdu brúkt allan blokkstuðulin, soleiðis sum andstøðuflokkarnir mæla til?

- Hvussu hevði støðan hugsandi verið í føroyska búskapinum, um uppskotini um nýggjan studning til vinnuna frá fólkaflokkinum og javnaðarflokkinum vórðu samtykt í undanfarnu tingsetu?

- Hvør er munurin millum búskapin og búskaparpolitikkin í dag, har vit hava lagt blokkstuðul til viks og samstundis gjalda niður skuld - og so støðuna í 80'unum, tá vit brúktu allan blokkstuðul og ikki rindaðu nakra skuld?

- Hvussu nógv restar í og hvat krevst til vit eru púra leys ev donskum studningi.

# Til allar politikarar

**Rebekka R. Petersen**

Eg vil gjarna her sleppa at siga mína meining um samkynt parlag...

Hvat hugsa tit fyri tykkum? Eg eri ein genta upp á 13 ár og sjálvt eg veit ella síggi, at hettar er heilt hol í høvdið. Eg hevði doyð av skomm, um mamma og babba bæði vóru sama kyn.

Sjálvandi skal man ikki fara í kríggj móti samkyntum, ella gera nakað móti teimum. Men man skal so heldur yvirhøvur ikki broyta lógina til teirra fyrimun. Tað er tað sama, um eg føli, at eg má stjala hvønn dag. So skulu lóginar ikki broytast. Tað eri eg, sum havi skeivt. Tað stendur jú í Bíbliuni!! So tað má ein og hvør síggja, at hetta er heilt burturvið.

Og so hasin maðurin, sum skrivaði í Sosialin: Tann av tykkum, sum er uttan synd, kasti fyrsta steinin. Tað hevur faktisk einki við sakina at gera! Tann kvinnan, sum Jesus segði tað um vildi broytast, men tú sigur tað og livir víðari samkyntur, sjálvt um tú veitst, at tað er synd, tí tað skrivaði tú sjálvur!!

Fyristillið tykkum Føroyar um 15 ár, um hettar verður loyvt. Tín fitta yndisliga Didda verður gift við hennara bestu vinkonu, tí at tær vóru longu forelskaðar sum lítil børn. Hevði tú verið glað/ur?

Ja men hattar var bara tað eg vildi siga, og so hopi eg, at tit teinkja tykkum eitt sindur betur um.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Ráðstevna við slagsíðu

**Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi skipar í komandi viku fyri ráðstevnu um framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum. Eitt sera áhugavert evni. Men tíverri hevur trongskygni snýkt seg inn í ætlanina serliga frá føroyskari síðu, tí meðan bæði Danmark og Grønland eru umboðaði við tveimum flokkum, so er tað bert Tjóðveldisflokkurin, sum skal umboða føroyska boðið**



**upp á framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum**

**Jóannes Eidesgaard**

Einflokkaskipanina kendu vit eystan fyri jarntjaldið, men líkt er til, at í minsta lagi ein føroyskur flokkur heldur, at so leingi teirra flokkur er umboðaður, so er føroyski sannleikin umboðaður. Spell kortini, tí evnið á ráðstevnuni er bæði áhugavert og týdningarmikið.

Í einum tíðindaskrivi frá Norðuratlantsbólkinum verður sagt, at Danmark verður umboðað av Svend Auken, næstformanni í Fólkatinginum úr danska Javnaðarflokkinum og Henriettu Kjær, almannamálaráðharra úr Konservativa flokkinum. Grønland verður umboðað við komandi formanninum úr Siumut (Javnaðarflokkinum), Josef Motzfeldt úr IA umframt teir báðar fólkatingslimirnar Lars Emil Johansen úr Siumut og Kuupik Kleist úr IA.

Tá tað so kemur til Føroya, so er umboðanin avmarkað til Høgna Hoydal úr Tjóðveldisflokkinum og Torbjørn Jacobsen úr Tjóðveldisflokkinum.

Nú veit eg ikki, hvat tjóðveldisumboðini ætla sær við ráðstevnuni, men vanligt er, at tá ráðstevna verður hildin, so leggur man seg eftir, at evnið verður so breitt og sakliga lýst sum gjørligt. Hetta er beinleiðis ein skylda, serliga tá ráðstevnan skal vera fyri almenninginum.

Tí undra tað meg stórliga, at Norðuratlantsbólkurin ikki hevur boðið eitt nú hinum fólkatingsliminum úr Føroyum Lisbeth L. Petersen við. Ella tá man nú hevur javnaðarflokkarnar úr bæði Grønlandi og Danmark við, so hevði tað uttan iva verið uppá sítt pláss, at føroyski Javnaðarflokkurin var umboðaður. Men tað er hann so heldur ikki.

Tað kann væl ikki hugsast, at teir eru bangnir fyri, at onkur onnur rødd úr Føroyum kundi sagt nakrar sannleikar, sum kámaðu eina mynd, teir sjálvir ætla at mála fyri áhoyrarunum. Og um so er, ja so er als ikki talan um nakra ráðstevnu.

Men Tjóðveldisflokkurin hevur so valt øðrvísi. Hetta mugu so áhoyrarar og ikki minst fjølmiðlar taka við, um teir t.d. ætla sær at brúka nakað av tí, sum kemur fram á ráðstevnuni. Tí føroysku sjónarmiðini eru við slíkari einflokka umboðan frammanundan einsrættaði.

Kanska skuldi Lisbeth L Petersen sum umboð á Fólkatingi longu nú tikið stig til at fyriskipað eina alternativa ráðstevnu við breiðari umboðan fyri at fáa evnið: "Hevur ríkisfelagsskapurin nakra framtíð?" lýst til fulnar. Og sjálvandi skuldi Tjóðveldisflokkurin verið umboðaður, men sjálvsagt ikki einsamallur. Tá høvdu vit møguleikan til at fingið eina ráðstevnu við javnvág og ikki sum nú við stórari slagsíðu.

# Trúði ikki mínum egnu oyrum

**Jórun Simonsen**

Nå har jeg vært fra i borte fra Færøyene i flere måneder, og blandt annet på 50 års jubileumsfest for studentene på en Osloskole, hvor jeg ble bedt om å holde festtalen, fordi jeg bodde i et så spennende land som Færøyene.

Jeg holdt også en festtale, og mine gamle skolekammerater ble ikke ferdige med å spørge videre, om hvordan vi hadde det her oppe, for de syntes, at det var så spennende, alt det, jeg hadde å fortelle.

Derfor et det litt flaut, å komme tilbake etter ferien, og oppleve episoder, som jeg bestemt ikke ville nevne for mine venner i Oslo.

Vår borgmester klipper snoren av i et privat handelssenter for en Burger King restaurant. Her er kommentarer helt overflødige.

Samtidig har innredning av to leiligheter for menningartarnad blitt stanset i flere måneder, fordi deres tilstedeværelse, kan forårsake at husene ved siden av kann miste verdi.

Jeg trodde ikke mine egne ører.

Jeg kjenner mange homoseksuelle i Norge, og de har det heller ikke lett.

Men er det da ingen grunn til at de ikke skal få samme rettigheter her på Færøyene, som de får i resten av Norden. Så får man da for søren venne seg til, at de har like rett til å bo i sitt hjemland, som vi andre har det.

Nu må vi passe litt på.

Er vi blitt så velpolerte her, at vi ikke kan huse alle mennesker? Kommer der striper i lakken, kanskje?

Da jeg bodde her i 1956, kjente jeg da flere homoseksuelle, og de ble da alminnelig ekseptert, så vidt jeg kan minnes.

Det siste hjertesukk, som blir større og større, er det: at alle barn, skal kjøres til skolen hver dag.

Man har visst glemt, hva man har ben til.

I Danmark rører barna seg alt for lite, men hvordan er det her i landet?

Jeg bor sånn, at jeg kan se alle bilene om morgenen, som setter sine barn av ved Venjingarskolen.

Hvis alle de barna, som nå blir kjørt, begynte å gå, ville det da bli god plass til vandrende barn over Frælsinum?

Det er mitt ønske som forhenværende idrettslærer: Masser av vandrende barn på vei til skole om morgenen, og noen få, men hensynsfulle trafikanter, som virkelig kan opleve, at deres barn får beveget seg, uten fare for liv og helse.

Det skulle da ikke være umulig?

# Pedofilu eru ein minniluti

**John S. Myllhamar**

Havi av serligari orsøk ikki kunnað svara høvundanum av greinini »Samkynd og samlevnaður«. Men fari eins og hann, at loyva mær at koma við mínum hugleiðingum um fortíðina og løgnu hugsanum og spádómum um framtíðina. Nakað av hesum ljóðar ivaleyst sum verri vavstur fyri mong, og verði eg neyvan sum hann, eymur í øksluni av herðaklappum. Man kona gloyma bróstabarn sín, ein móðir tað barn, hon bar undir hjarta?. Soleiðis æt tað í forum. Men har heiðinskapur valdaði ella har hann tók til, fjaraði henda ábyrd og ábyrdarkensla burtur, og mamman, og sjálvsagt pápin við, komu at gerast sjálvsøkin tá í táttaði; tað tikist sum tey hugsaðu einans um teirra rættindi og tørv, heldur enn at geva barninum seinasta bitan. Tí var barnið sett út millum villdjór og skrætt sundur. Helst gjørdist ta ein sjálvfylgja og kendist ikki petti svárt fyri nakran. Ikki var ta teirra fávitska, ið framdi hetta, tey dugdu líka væl at hugsa og rokna út sum okkara ætt. Tíverri kom so læran um Hvíta Krist og spilti hendan lætta mátan at sleppa av við børnini, Nýggja læran legði upp til at foreldrini skuldu taka ábyrd, og komu at líkjast honum, ið setti lív sítt til fyri onnur.

Einaferð var mett av stórum parti av fólkinum, at tað var bæði synd og skomm og eisini dráp at taka eitt barn úr móðurlívi uttan orsøk. Men so hvørt sum religiónin humanisman, (t.e. trúgvin á menniskjans óavmarkan og óavmarkaðu møguleikar) fekk fastari tak í fólkinum, var lóggivið fyri, at hugsast skuldi ikki um barnið, men um frælsið hjá mammuni at ráða yvir egnum kroppi. Nú er bara ein leivd av religøsum fanatikarum eftir, sum halda tað vera skeivt, at "eitt nokkso stórt lítið barn, liggur og spjálkar í einari ruskkurv á einum sjúkrahúsi, inntil lívið spakuliga fjarðar út" (sitat eftir minninum, frá danskari ljósmóðir), Tó, nú vesturheimurin er við at gerast eitt stórt ellisheim, tí ov fá børn vera fødd, mugu menn við rygginum móti múrinum viðganga, at okkurt var skeivt við útrokningin.

Fyri ikki so mongum árum síðan, hevði eg gjørt teg til drápsmann, um eg bað teg taka meg av døgum. Men við religiónini humanismuni, er fatanin av lívinum vorðin ein onnur. Nú verður lóggivið í londum rundanum okkum, at tú kanst bestilla tín deyðsdag frá einum lækna, sum, heldur enn at vera um teg og linna um pínu og einsemi, ger tær eina bjarnatænastu við at gevur tær banastingin. Eutanasi verður tað rópt. Tá ið hann hevur útint gerning sín, vaskar hann róligur hendurnar og setist aftur at sjóða uppi yvir einum kaffikoppi - møguliga um yvirgangsatgerðina á World Trade Center, hvussu ræðuligt tað er har bólkar leggja tilrættis hvussu menniskju skulu vera tikin av døgum.

Í dag er meirilutin ímóti - ja, tað er kriminelt, at tey pedofilu skulu hava loyvið at liva saman við og at hava samlegu við børn. Tað er bara ein minniluti, sum metir hetta skal vera loyvt. Ein minniluti, sum í londum, vit føroyingar "serstøk tjóð" skulu sammeta okkum við og laga okkara lógir eftir, hevur verið alment frammi, og er í ferð við, ella hevur organisera seg og stónað sítt egna felag. Hesin minniluti stríðist sjálvandi eisini fyri sínum rættindum. Enn er til ein leivd av kristnu fatanini, at barnið er hitt veikara, (undantikið allar veikasta barnið, tað í móðurlívi) og tí er lóggeving fyri hesum óhugsandi - enn. Men tíðir og hugburðir broytast. Hvønn fer humanisman tá ið tíðin er búgvin, at taka meira hensyn til, barnið ella tørvin hjá hesum menniskjum at hava onkran at elska og at nøkta sínar girndir?

Nei, tað má vera ein svakur persónur, sum skrivar sovorðið innlegg, ein, ið sær trøll á alljósum degi. Skilaleyst tos, ikki satt? Men møðuliga fær hesin ørvitisknokkur rætt, ikki beinanvegin, tí tillagingin tekur ár. Sum høvundin so rætt tekur til: Tað er altíð soleiðis tá ið vit síggja okkurt ókent, óvanligt og óhugsandi, so ógvast vit við. Men vit venjast við, og við tíðini er tað ikki óvanligt longur.

Ein loyvir sær at hava sína trúgv og vón á humanismuna tá ið hon setur seg á hásæti hins hægsta, og ein loyvir sær at hava sínar spádómar eins og høvundin, tá ið hann skrivar: Tey rættindi liggja helst langt úti í framtíðini tá ið vit kunnu hugsa okkum hjúnaband millum einar seks persónar.

Nýggj ættarlið koma til. Tey skal avloysandi religiónin humanisman ala upp at virða rættin hjá øllum minnilutum, læra, sambart sama høvunda, at hugsa ótraditionelt, so at tað, sum er ónáttúrligt, og ein kann skoyta uppí, ella kriminelt í okkara tíð, verður náttúrligt og ikki kriminelt fyri teimum. Tey kunnu eitt nú verða lærd at hava aðra fatan av einum barni enn vit, sum í dag liva við tí kristnu fatanini. Hvør sigur t.d. at tú skal verða átjan ár fyri at vera komin til lógaldurs? Tað er bara okkara generatión, sum hevur funnið uppá tað aldursmarkið. Kann aldurin fyri at vera myndigur ikki bara setast niður til óvitaaldur? Lógaldurin var jú nógv hægri fyri 50-100 árum síðani.

Og tað kriminella er ikki kriminelt eina løtu longur tá ið lóggivið er fyri broytingum

Eitt annað, ið kemur einum til hugs, tá ið høvundin tosar um ættleiðing, er 4 boð í Halgubók, sum ljóðar: Æra faðir tín og móður tína. Tað má umskrivast tá ið vit ikki longur skulu byggja lógir á bíbilskar skriftir, tí tað verður diskriminerandi. Møðuliga kann tað ljóða: Æra faðir tín og mannin hjá honum. Nei tað ber nú ikki til, tí hin seinni er jú eisini annað av foreldrunum. Men onkur formulering finnist nokk.

Í síðsta enda fer tað at kennast ómenniskjaligt fyri humanismuna, at nakar minniluti skal kenna seg settan eftir, at ein pedofilur verða hóttur við fongsli og leinkjum, og ikki fær rætt at vera soleiðis sum hann er skaptur. Hvør taparin ella vinnarin tá verður, barnið ella hin pedofili, ja, tað skulu ivaleyst verða deildar meiningar um.

Humanisman veitir syndanna góðkenning, kristindómur veitir syndanna fyrigeving. Humanisman og kristindómurin kunnu tí ikki sameinast, tey verða mótsetningar. Humanisman er avmarkað og deyðilig, tí hon er trúgvin á menniskja. Kristindómur er óavmarkaður og ævigur, tí hann er trúgvin á hin upprisna.

Men nú má Niklas Niklái leggja griffilin, áðrenn hann verður bundin niður